# Landssjúkrahúsið søkir eftir leiðara til Køkin

Eitt spennandi og avbjóðandi starv sum leiðari í Føroya størsta og mest fjølbroytta køki er leyst at søkja til setan 1. januar 2011 ella eftir avtalu.

Umframt at framleiða mat til sjúklingar og starvsfólk á Landssjúkrahúsinum, flýggjar Køkurin eisini mat út úr húsinum. Til Køkin hoyrir eisini ein matstova eins og ein kafé, sum er staðsett í forhøllini.

**Ábyrgdarøki:**
Høvuðsuppgávan hjá Køkinum er at framleiða og veita heilsugóðan mat til sjúklingarnar.

Komandi leiðarin skal í tráð við visjónina hjá Landssjúkrahúsinum halda fram við tí menning, sum Køkurin hevur verið og er í gongd við. Køkurin, sum er frá seinast í 60'unum, hevur tørv á eini størri nýmótansgerð. Í framtíðarútbyggingarætlanini hjá Landssjúkrahúsinum, er ætlanin at byggja ein nýggjan køk. Í hesi tilgongd kemur leiðarin í Køkinum at hava ein sjálvsagdan leiklut.

**Persónligir eginleikar:**
Vit ynskja ein leiðara, sum tekur ábyrgd fyri tí fakliga støðinum, sum uppgávurnar hjá Køkinum vera framdar á. Harumframt skal leiðarin kunna raðfesta og stýra virkseminum hjá Køkinum, herundir arbeiðsgongdir og mannagongdir.

Tað er umráðandi, at leiðarin hóast atfinningar er viðtøkuførur og stendur við tær avtalur og avgerðir, sum hann ger, eisini undir trýsti.

Viðkomandi skal duga at lurta eftir starvsfólkunum og hava eitt opið samskifti við tey.







## Fakta um Landssjúkrahúsið

Við 850 starvsfólkum við umleið 30 yrkisbólkum er Landssjúkrahúsið størsta einstaka arbeiðspláss í Føroyum

29 læknaligar sergreinar (herav 9 konsulentskipanir)

180 sengur, herav 55 sengur á psykiatriska deplinum

9.000 innleggingar um árið

30-35.000 ambulantar vitjanir um árið

400.000 analysur i kliniskari kemi um árið

18.000 røntgenkanningar um árið

Vit eru vorðin grønari

**Týdningarmiklastu uppgávurnar hjá leiðaranum í Køkinum tey fyrstu 2 árini verða:**
- at leiða Køkin á skynsaman hátt innanfyri givnar fíggjarkarmar
- at menna samstarvið við deildirnar og deplarnar á Landssjúkrahúsinum
- at mynda Køkin yvirfyri viðskiftafólkunum
- at leiðarin við sínum leiðsluhátti gevur møguleika fyri menning, jaligum samskifti og góðum trivnaði hjá starvsfólkunum

**Umsøkjaraprofilur:**
- Tú hevur útbúgving sum økonoma, professionsbachelorútbúgving so sum "Ernæring og Sundhed med speciale i Cateringledelse" ella líknandi
- Tú hevur leiðsluútbúgving á diplomstøði ella tilsvarandi
- Tú hevur í minsta lagi 5 ára royndir innan starvsfólkaleiðslu
- Tú hevur dagført tína útbúgving
- Tú hevur royndir við at tilevna serkostar
- Tú hevur góðan telduførleika og kann læra frá tær
- Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir frá sjúkrahúskøki
- Tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til skipanir so sum Master Cartering, Socamel mattransport, FSL o.a.

**Vit bjóða:**
- fakliga- og fyrisitingarliga spennandi og avbjóðandi uppgávur
- leiðslu av 20 dugnaligum og royndum starvsfólkum
- ein góðan og óhátíðarligan samverutóna
- toymisarbeiði saman við tveimum deildarøkonomum, sum standa fyri dagligu framleiðsluni

Løn og setanarviðurskifti eru í løtuni smb. sáttmálan millum Kost- og Føðslufelagið og Fíggjarmálaráðið

Køkurin er partur av Tænastudeplinum á Landssjúkrahúsinum, og hevur køksleiðarin tilvísing til depilsleiðaran

**Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til 304500 og tosa við:**
Jóan Símun Saltá, depilsleiðara, lokal 1021,
t-postur: lsjoasa@ls.fo

Umsóknarfreistin er 22. november 2010 kl. 12.00
Setanarsamrøður verða í viku 47

**Skrivlig umsókn við CV skal sendast til:**

Landssjúkrahúsið
J.C. Svabosgøta
FO 100 Tórshavn
att: Lønar- og starvsfólkadeildin

Frumrit av prógvum, møguligum viðmælum e.l. skulu havast við til setanarsamrøðuna

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ · J.C. SVABOS GØTA
100 TÓRSHAVN · TEL. 304500 · FAX 314253
LS@LS.FO · WWW.LS.FO

Upplýsingar um Landssjúkrahúsið finnur tú á okkara heimasíðu www.ls.fo

Sosialurin 341800